# 31.5.2016 – Alheimsroykleysur dagur

## Fyrireika teg til tubbaksinnpakking við ongum lýsingum

### Í Norðurlondum doyggja stívliga 37 000 fólk árliga av sjúkum, sum elvdar eru av tubbaki.

Hvørt ár doyggja 37 800[1] fólk í Norðurlondum av sjúkum, ið elvdar eru av tubbaki, og um allan heim doyggja seks milliónir. Nógv teirra doyggja av krabbameini. Norðurlendsku krabbameinsfeløgini sameinast tí í dag á Alheimsroykleysa degnum við tí felagsmáli at fyribyrgja tubbaksnýtslu ímillum børn og ung. Vit – krabbameinsfeløgini í Norðurlondum – koma tí við teirri áheitan, at einføld innpakking verður sett í verk í øllum Norðurlondum.

### Hví einfalda innpakking?

Tey hálvvaksnu eru tey, sum einføld innpakking miðar eftir, og altjóða gransking avdúkar týðiligan samanhang ímillum einfalda innpakking og útbreiðslu av royking. Einføld innpakking av tubbaksvøru stendur fyri tiltøkum, sum avmarka og banna at nýta búmerki, litir, merkjamyndir ella átaksupplýsingar á pakningi. Á pakkanum skal einans vera merkjanavn og vørunavn víst í heilt einføldum liti og skriftsniði. Í desember 2012, varð Avstralia fyrsta land at seta endaliga í verk einfalda innpakking. Og tey hava prógvað, at einføld innpakking virkar[2].

Altjóða kanningar vísa, at einføld innpakking av tubbaksvøru:

- verður hildin at vera minni lokkandi, serliga millum ung
- verður hildin at hava verri góðsku og smakk
- ger heilsuávaringar sjónligari
- ger tubbaksvøru minni sjónliga í almenna umhvørvinum
- fyribyrgir, at farið verður at roykja og ger sítt til, at summi leggja av

Fylgja vit fyridøminum í Avstralia, og nú seinni í londum sum Bretlandi, Írlandi og Fraklandi, halda vit, at hetta fer at vera tað amboðið, ið fer at muna mest av tí, vit hava tøkt til tess at forða ungum norðurlendingum at fara at roykja.

---

[1] Tubbakselvdur deyði í Norðurlondum: Noreg 6600, Svøríki 12 000, Danmark 13 900, Finnland 5 000, Ísland 200, Føroyar 120.

[2] https://www.cancervic.org.au/plainfacts/

## Áheitan um atgerð

Leiðreglur til grein 11 og 13 í WHO rammusáttmálanum um tubbakseftirlit (WHO FCTC) mæla til, at partarnir seta í verk einfalda innpakking. Fleiri lond eru komin langt við tankanum um at seta í verk lóggávu um einfalda innpakking. Okkara áheitan er tí at seta í verk einfalda innpakking í øllum Norðurlondum.

## Tubbaksfrí Norðurlond

Tubbaksnýtsla er ein høvuðsorsøkin til krabbamein. Nú á døgum roykja 3.5 milliónir[3] í Norðurlondum. Krabbameinsfeløgini í Norðurlondum virka øll fyri tubbaksfríum samfeløgum. Í fleiri Norðurlondum eru fleiri greiðar yvirlýsingar gjørdar um tubbaksfrí samfeløg. Skal tað eydnast okkum at gera tubbaksnýtslu til farna søgu, tørvar okkum at hyggja at nýggjum og munadyggum átøkum.

Vit eru sannførd um, at einføld innpakking er týdningarmikið tiltak, sum minkar eftirspurningin og flytur okkum nærri tubbaksfríum Norðurlondum.

[3]Roykjarar í Norðurlondum: Noreg 900 000, Svøríki 970 000, Danmark 780 000, Finnland 755 000, Ísland 55 000, Føroyar 6000.